Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo





*Kartni Jacobsen, brandmeistari, Heiðrikur Christiansen, brandmaður, og Heðin Mortensen, býráðsformaður*

Heiðrikur Christiansen:

# 20 ára starvsdag á Brandstøðini

Týsdagin 15. februar hevði Heiðrikur Christiansen 20 ára starvsdag hjá Tórshavnar Sløkkiliði.

Heiðrikur er 44 ára gamal, havnarmaður, og útbúgvin snikkari. Hann varð settur sum leysur brandmaður 15. mars 1985 og sum fastur brandmaður 8. juli sama ár.

Hann er íðin B36 viðhaldsmaður og fæst nógv við at kava, bæði í sínum arbeiði og í frítíðini.

Heiðrikur er giftur við Masu úr Leirvík, og børnini eru trý í tali.




MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

Sosialurin -har tað hendir


# 8. flokkur í Tórshavnar kommunuskúla í 1966

Í sínum arbeiði við at finna fram tilfar til "Havnar leksikon", kemur Birgar Johannessen fram á nógvar áhugaverdar myndir. Her er ein mynd av 8. flokki í Tórshavnar kommunuskúla í 1966.



*Aftasta rað f.v.: Gunnar Rubeksen, Tórhild Danielsen, Sunrid Højgaard, Alice Poulsen, Agnar Bech, Beinta Fosaa, William Hansen og Jórun Mortensen*
*Miðraðið, f.v.: Otto Rubeksen, Elna Nolsøe, Jórun Justesen, Ása Johansen, Ruth Dam, Sigrid Sørensen og Erla Poulsen*
*Fremsta rað, f.v.: Randi Jørgensen, Kjartan Dam Joensen, Mortan Danielsen, Hans Birgir Olsen, Theodor Andreasen, Christian Ihlen, Tommy Olsen og Finnbjørn Justinussen*

*Mynd: Føroya Fornminnissavn*